# ÁRSINS VITANARFRÓÐU

KAPPING 2019/20

## HVUSSU SKITIÐ ER SANDSVVATN?




Granskarar: 6. Flokkur í Sandoyar Meginskúla

# INNGANGUR

Vit hava granska hvussu skitið Sandsvatn er, og hvat ger tað skitið. Vit hava verið úti og gjørt kanningar og hava onkra samrøðu við onnur fólk.

Lærari:

Jógvan Vest

jv1203n3@skulin.fo

Luttakarar:

Ata, Sissal, Vár, Karin, Andrea, Sarita, Martin, Demmus Rói, Kjartan, Jákup Andrias, Sigurður, Brandur, Sesilia, Sandra, Rúna, Sámuel og Elsi.

Vit loyva, at frágreiðingin verður løgd á gransking.fo, og
at tilfar úr henni kann verða nýtt til marknaðarføring

# INNIHALD

1. Hetta undrast vit á

- Hvussu skitið er Sandsvatn

2. Hví er tað so?

- Tunnilin
- Áarføri
- Taðing

3. Legg eina ætlan

- Dreggja plankton-trol
- Samrøður
- Vatnroyndir

4. Savna upplýsingar

- Mýggjabitaringrás
- Hyggja eftir muninum á vatninum
- Lukta vatnið
- PH virði
- Samrøðu við verkfrøðing hjá NCC
- Støv úr tunlinum

5. Hetta eru vit komin fram til

- Tunnilin dálkar
- Ikki so skitið at mýggjabitar ikki klára at liva
- PH virði er ymiskt
- Tað er munur á kranavatni og Sandsvatni
- Meira skitið í tí grunna enn tí djúpa

6. Sig øðrum frá

- Plakatir

Fylgiskjøl

# 1. HETTA UNDRAST VIT Á

Vit undrast á, hvussu skitið Sandsvatn er. Vit halda tað hevði verið áhugavert at kanna, eftirsum at tað liggur beint við síðuna av skúlanum.

# 2. HVÍ ER TAÐ SO?

Av og á síggja vit at vatnið verður myrkari, og meira gruggut.

Vit halda tað kann vera av:

- Tunnilsarbeiðinum
- Áarføri
- Taðing

# 3. LEGG EINA ÆTLAN

Vit byrjaðu við at fara at dreggja við plankton-troli, og tað lótu vit standa í køliskápinum í tvær nætur. Í meðan tað stóð í køliskápinum gjørdu vit vatnroyndir og botnroyndir. Vit ringdu eisini til verkfrøðingin, Hendrik Egholm, hjá NCC at spyrja, um tunnilsarbeiði ávirkar, hvussu skitið vatnið er.

# 4. SAVNA UPPLÝSINGAR

Botnroyndir gjørdu vit á trimum ymiskum støðum á Sandsvatni: við Oyrarodda, Inni á Fløtum og Inni í Dal.










Vit fóru við einum plankton-troli og eini livurposteig-krukku.
Plankton-trolið brúktu vit at taka vatnroyndir, har trolið skilti vatn og lívverur. Tá vit koyrdu vatnið úr plankton-trolinum í krukkuna, so varð nógv lívfrøðiligt tilfar í. Hetta fóru vit so at kanna í skúlanum.

Tá vit komu í skúlan, so brúktu vit sjóneyku fyri at kanna, hvat ymiskt lív vit funnu. Hetta eydnaðist væl.

Við royndunum, sum vit gjørdu, funnu vit:

| Mýggjabita egg: | Mýggjabita ormveru: | Mýggjabita reivveru: | Og sjálvan mýggjabitan: |
|---|---|---|---|
|  |  |  |  |

Og at enda høvdu vit alla mýggjabita-ringrásina:



Tann fyrsta dagin fóru vit út á vatnið og koyrdu vatn í eina fløsku, og samanbóru tað við vanligt kranavatn.




Vit síggja á myndini at vatnið av Sandsvatni er myrkari og meira gruggut.

Vit høvdu eisini eina samrøðu við verkfrøðingin hjá NCC, Hendrik Egholm. Vit spurdu, hvussu Sandoyartunnilin ávirkaði vatnið.
Hann segði, at tað burdi onki komi úr tunlinum, tá tað ikki regnar. Tann dagin, tá
ið tað rann oman í vatnið, var tað tí, at eitt óhapp hendi. Teir hava nýggjan brunn nú, sum
er heilt góður. Alt vatnið, sum kemur úr tunlinum fer
í gjøgnum ta svørtu slanguna, ið liggur fram við vegnum til Skopunar og
fer síðani út á streymasjógv. Støv frá bilunum, sum koyra í turrum veðri leggst í veitir og annað. Tá ið tað regnar verur hetta ført oman í ánna, ið rennur út í vatnið.

Vit mátaðu eisini pH virði.
Vatn er hvørki súrt ella basiskt
Vatn hevur pH 7
Sýrur hava lágt pH virði. Sitrón er súr. pH 2
Basur hava høgt pH virði sterkasta.
Sápa er basiskt. pH 12
Ein av sterkastu sýrum er saltsýra HCL
Ein av sterkastu basum er sterk sápa.
Hon er 10 pH

Vit kannaðu pH virði í 3 støðum á Sandsvatni.

Oyraroddin sunnast á vatninum er pH virði 8

Inni á Fløtum innan fyri Traðir er pH virði 7

Inni í Dal við skúlan er pH virði 6

Eisini brúktu vit plankton-trol at trola eftir djóra æti. Har er pH virði 6
Niðurstøða: sunnast á vatninum er pH virði 8
Innari á vatninum lækkar pH virði eitt lítið vet



# 5. HETTA ERU VIT KOMIN FRAM TIL

- Tunnilin dálkar Sandsvatn, men vit kunnu ikki siga, hvussu nógv. Tennisfelagið sigur, at tað einans var ein dag, har tað beinleiðis rann úr tunlinum og á vatnið. Tað sum nú kemur er støv og annað, ið kemur av arbeiðinum sjálvum.
- PH virði er ymiskt ymsastaðni á vatninum, men tað broytist ikki so nógv.
- Vit funnu fram til mýggjabitaringrásina, har vit hava sæð mýggjabita egg, mýggjabita ormveru, mýggjabita reivveru og sjálvan mýggjabitan. Mýggjabitan funnu vit í maganum í sílum, ið ein onnur granskingarverkætlan arbeiðir við. So vatnið er ikki so skitið, at mýggjabitar ikki klára at liva har.
- Vit sóu meiri dálking á botninum, har tað var grund - á Oyrarodda – enn vit sóu aðrastaðni, har tað var djúpari.
- Luteindin vísti okkum eisini, at har tað var sandbotnur og grunt, luktaðu vit stóran mun á ymisku plássunum. Aftur her, var tann skitni botnurin av Oyrarodda tann, ið luktaði verst. Leggjast kann afturat, at bollin, ið vit goymdu botnroyndina av Oyrarodda, var so skitin, at vit ikki fingu luktin úr honum, tá vit vaskaðu hann, so vit máttu beina hann burtur.
- Plankton-trolið vísti okkum, at har vóru nógvar lívverur í sjálvum vatninum. Við trolinum kom onki av botninum í roynd okkara.
- Samanbering av vatni av Sandsvatni og kranavatni vísti okkum, at vatnið av Sandsvatni var skitnari og eitt sindur gruggut.

# 6. SIG ØÐRUM FRÁ

Vit ætla okkum at gera eina plakat av kanningarúrslitinum, sum vit síðani fara at heingja runt á skúlum og øðrum almennum støðum á Sandoynni. Plakatin skal minna um tær vísindaligu plakatirnar, ið vit vanliga síggja í gransking. So kunnu tey, sum vitja oynna og búgva her síggja, hvat livir í Sandsvatni og hvussu skitið tað er. Hetta kann møguliga fáa tey, ið ráða at syrgja fyri, at vatnið hevur tað so gott sum gjørligt.

# FYLGISKJØL

1.

2.

3.

4.